Álit

í

løgtingsmáli nr. 122/2020: Uppskot til løgtingslóg um at banna mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum

Høgni Hoydal, Sirið Stenberg, Bjørt Samuelsen, Beinta Løwe Jacobsen og Hervør Pálsdóttir, løgtingsmenn, hava lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 17. mars 2021 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 22. mars, 7., 12. og 14. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri MEGD, LGBT Føroyar, Starvsfelagið, Føroya Arbeiðarafelag, Fakfelagssamstarvið, Føroya Arbeiðsgevarafelag og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Christian Andreasen, Frimodt Rasmussen, Erhard Joensen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er sjálvsagt, at mismunur eigur ikki at verða gjørdur á arbeiðsmarknaðinum. Fleiri lógir eru longu galdandi, sum seta bann fyri mismuni. Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn skal forða fyri, at mismunur verður gjørdur á arbeiðsmarknaðinum vegna kyn, og Løgtingið samtykti í 2011 løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna brek. Europeiski mannarættindasáttmálin, sum í 2000 varð settur í gildi sum lóg, setir somuleiðis forboð fyri, at mismunur verður gjørdur, og harumframt hevur ST-sáttmáli um at basa øllum sløgum av mismuni vegna rasu verið í gildi fyri Føroyar í 30 ár. Øll henda lóggáva hevur sum endamál at tryggja, at mismunur ikki verður gjørdur.

Fyriliggjandi uppskot skal sambært sínum endamáli tryggja javnviðgerð og banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna rasu, húðarlit, átrúnað ella trúgv, politiska áskoðan, kyn, kynsligan samleika, kynsliga sannføring, aldur, brek ella tjóðskaparligan ella fólkaeyðkenniligan uppruna. Hóast meirilutin er samdur um, at mismunur ikki eigur at verða gjørdur á fólki vegna nevndu umstøður, er meirilutin av teirri áskoðan, at uppskotið hevur ikki fingið nóg gjølliga viðgerð til at kunna verða samtykt, tí uppskotið viðger umstøður á føroyska arbeiðmarknaðinum, sum fyrst og fremst eiga at verða viðgjørdar av pørtunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Uppskotið hevur munandi løgfrøðilig ivamál við sær, tí tað inniheldur eina rød av hugtøkum, sum tað ikki er vanligt at lóggeva um. Eitt nú inniheldur uppskotið ymiskar normar, sum ikki eru vanligir í lógartekstum, so sum hugtøk "óynsktur munnligur ella likamligur atburður" og "ódámligt hugalag". Uppskotið inniheldur eisini fleiri ivamál viðvíkjandi mismuni vegna aldur, og spurningurin um at áleggja arbeiðsgevarum bøtandi tiltøk er ein spurningur, sum má metast at vera partur av sáttmálagrundarlagnum á privata arbeiðmarknaðinum. Meirilutin heldur somuleiðis reglurnar um prógvbyrðu og kærur vera rættiliga ivasamar. Tað sama ger seg galdandi fyri ásetingina um, at lógin kann skúgva til viks ásetingar í kollektivum sáttmálum v.m.

Lóggáva sum hendan eigur at fáa eina gjølliga viðgerð, fyrst og fremst av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, áðrenn hon verður løgd fyri Løgtingið.

Av nevndu orsøkum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Ingilín D. Strøm og Hervør Pálsdóttir) hevur hesar viðmerkingar:

Um vit sum samfelag vilja forða fyri, at mismunur verður gjørdur á arbeiðsplássinum, er tað neyðugt og sjálvsagt at skipa hetta í lóg. Fyrst og fremst fyri at tryggja rættvísa viðgerð tá ein er fyri mismuni, men eisini fyri at gera arbeiðsgevarum greitt, hvar markið gongur og fyri at vissa arbeiðstakaran um rættindi síni.

Eingin lóg er í gildi í Føroyum í dag, sum ítøkiliga tryggjar javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum, og sum verjir ímóti mismuni á arbeiðsmarknaðinum. Fleiri av grannalondunum hava líknandi lóggávu, og slík lóggáva eigur at vera partur av einum framkomnum og væl skipaðum arbeiðsmarknaði.

Javnstøðulógin hevur nakrar avmarkaðar ásetingar, men ein beinleiðis verja ímóti mismuni manglar, eins og tað manglar ein lóg um javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum.

Í 2017 tók #metoo rørslan dik á seg og varpaði ljós á eitt nú kynsliga happing ella sexsjikanu á arbeiðsmarknaðinum. Eisini í Føroyum søgdu kvinnur frá ógvusligum hendingum á heimasíðuni www.metooforoyar.fo. Í Danmark kyknaði kjakið av álvara og skapti nógvar ringar í sjónum, tá sjónvarpsvertinnan Sofie Linde segði frá ógvusligari kynsligari happing. Í Føroyum varð í ein ávísan mun kjakast um kynsliga happing, og varð tá víst á, at vit framvegis onga lóggávu hava, ið verjir arbeiðstakara ímóti kynsligari happing á arbeiðsmarknaðinum.

Meginreglur um javnviðgerð og bann mótvegis mismuni av øllum handa slag eru kjarnuhugtøk í fólkaræðinum, og neyðugt er at geva fólki serliga verju mótvegis mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna síni eyðkenni ella frábregði.

Hetta uppskotið verður við til at tryggja, at vit hava ein nútíðarbæran arbeiðsmarknað við javnbjóðis rættindum til allar løntakarar. At tryggja løntakarum javnviðgerð merkir, at tey skulu viðgerast líka. Hetta er galdandi bæði í mun til beinleiðis og óbeinleiðis mismun á arbeiðsmarknaðinum. Lógin verður galdandi á arbeiðsmarknaðinum, og er ikki ein almenn lóg um javnviðgerð og mismun.

Uppskotið bøtir eisini um møguleikarnar hjá fólki, sum bera brek. Í lógini er ásett ein tillagingarskylda. Hetta merkir, at tað verður álagt arbeiðsgevaranum at tillaga viðurskiftini á arbeiðsplássinum, soleiðis at fólk við breki kunnu virka á staðnum.

Uppskotið ásetir meginreglur um javnviðgerð, beinleiðis og óbeinleiðis mismun, allýsir happing, kynsliga happing og forðar fyri, at boð kunnu gevast um at gera mismun á arbeiðsmarknaðinum grundað á eyðkenni ella frábregði.

Hóast lógaruppskotið í vavi er stutt, er uppskotið víðfevnandi og gevur løntakarum og umsøkjarum verju, sum ikki áður er tryggjað við lóg í Føroyum. Føroyski arbeiðsmarknaðurin er væl skipaður, men tó hava fakfeløgini ofta víst á, at nógv lóggáva á økinum er gomul og hevur tørv á dagføringum.

Minnilutanum kunnugt verður ikki arbeitt við málinum í landsstýrinum, og tí røkist einki fyri, at tað haðani verða tikin stig til at geva løntakarunum betri lógarverju.

Seinnu árini hevur nógv kjak verið um aldur sum avgerandi fyri, nær fólk fara av arbeiðsmarknaðinum. Semja tykist vera um rættin til at fara av arbeiðsmarknaðinum við pensjónasaldur. Hinvegin eru alsamt fleiri, sum velja at útseta pensjónina og sum eisini vísa á, at aldur ikki skal vera eitt kriterium, tá ið fólk skulu av arbeiðsmarknaðinum. Landsfelag pensjónista hevur millum annað víst á, at tey ynskja fráfaringaraldurin avtiknan.

Minnilutin heldur ikki, at aldur frameftir eigur at vera eitt kriterium fyri, nær fólk fara av arbeiðsmarknaðinum. Tí setir minnilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 3, stk. 4 verður strikað.

Viðmerkingar:
§ 3, stk. 4 í uppskotinum ásetir, at aldursmørk verða varðveitt, um tey eru fylgja av rundskrivi, felagssemju ella kollektivum sáttmála, treytað av, at aldursmørkini eru objektivt og rímiliga grundað í einum lógligum endamáli innan fyri rammurnar av føroyskum rætti, og tiltøkini at røkka endamálinum eru hóskandi og neyðug.

Tað vil siga, at tað ber til at gera mismun vegna aldur t.d., tá ið persónur hevur nátt pensjónsaldur, ella tá alment sett gerast 70 ár, sum er fráfaringaraldurin hjá alment settum.

Við hesum broytingaruppskotinum verður undantakið um at loyva mismuni vegna aldur tikið burtur, og tað verður hereftir ikki mett sum saklig orsøk at seta onkran í starv, koyra onkran úr starvi ella at flyta fólk fram ella aftur í starvi ella at ávirka arbeiðskorini vegna aldur.

Við hesi broyting tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 21. apríl 2021

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg
	Hervør Pálsdóttir	